

Luttakarar til 30 ára haldið í Norðurlandahúsinum fyrrapartin. Mynd Jan Müller

# Hátíðarhildu 30 ára samanhald í Útnorði

**Jan Müller**

11.08.2015 - 15:31

Oljan.fo

Útnorðursamstarvið, eisini kent undir skandinaviska heitinum “Vestnorden”, millum Ísland, Grønland og Føroyar, hevur 30 ár á baki í hesum døgum og verður tað hátíðarhildið í Føroyum í sambandi við 31. ársfundin hjá felagsskapinum.

Í gjárkvøldið varð mentanarhúsið Løgshøll í Runavík karmur um stórt tiltak við luttøku av teimum trimum stjórnarleiðarunum úr Útnorðurlondunum umframt íslendska forsetanum. Haraftrat vóru valdu tingfólkini í Ráðnum umframt embætisfólk.

Fyrrapartin í dag varð dagurin so eisini hátíðarhildin í Norðurlandahúsinum við røðum. Millum røðararnar varð eisini íslendski forsetin, Ragnar Ólafur Grímsson, sum varpaði serligt ljós á leiklutin hjá Útnorðurlondunum í Arktis.

Seinnapartin er so ársfundur í Runavík.

Myndirnar eru frá fagnaðarløtuni í Norðurlandahúsinum.









